# Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjalds-skattalógina og skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 135 starvsfólk og er skipaður við einum stýri og trimum økisskrivstovum.

Stýrið heldur til á Argjum og høvuðsskrivstovurnar í Norðuroki, Miðøki og Suðuroki halda til í ávikavíst Saltangará/Klaksvík, Tórshavn og á Tvøroyri.

Á Norðurøkinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 35 starvsfólk.

www.tollskatt.fo

E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo

## Lýst verður eftir fólki til avbjóðandi starv á Norðurøkinum at byrja 1. august ella skjótast til ber.

**Vit vænta at tú**
hevur útbúgving frá hægri lærustovni, so sum HA, HD, Cand Merc ella líknandi. Eisini vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevnir, ert nærlagdur, fyrikomandi og arbeiðssamur. Hevur tú HH, skrivstovuútbúgving ella líknandi og ætlar at útbúgva teg víðari innan roknskap og grannskoðan, ert tú eisini vælkomin at søkja.

**Arbeiðsuppgávur:**
- samskifti við virkir og stovnar
- vitja fyritøkur
- eftirlit við skatta- og avgjaldsuppgerðum
- ummæla kæru- og dómsmál
- málsviðgerð

**Vit bjóða:**
- fjølbroytt og sjálvstøðugt arbeiði í nýggjum bygnaði, har tú hevur møguleika at ávirka arbeiðsgongdina
- fakligar avbjóðingar og møguleikar fyri eftirútbúgvingum
- flextíð

**Setanartreytir:**
Setanarøkið er Norðurøkið, men starvið fevnir annars um allar stovnar undir Fíggjarmálaráðnum. Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir:**
Send umsókn vid avriti av prógvi og upplýsingum um útbúgving og fakligar royndir til:

**Toll- og Skattstovu Føroya, Norðurøki**
Postboks 2151 · FO-160 Argir
Stílað: Ingolf Lamhauge, økisstjóri.

**Umsóknarfreist: 16. juli 2007**

Fleiri upplýsingar fært tú við at venda tær til Elsu Brimvík, deildarleiðara ella Ingolf Lamhauge, økisstjóra á tlf. 352600.



# Toftild
alternativt hár

## Hár fyri lívið!

**HOTEL HAFNIA Í TÓRSHAVN**
Leygardagin 18. august '07
&
Sunnudagin 19. august '07

**SJÓMANSHEIMIÐ Í KLAKSVÍK**
Mánadagin 20. august '07

**HJÁ SÓLVU Á STRONDUM**
Týsdagin 21. august '07
fyrrapartin

**HJÁ FRÍGERÐ Í TÓRSHAVN**
Týsdagin 21. august '07
seinnapartin

Vinarliga ring og bílegg tíð á fartel. +45 4050 3211

So komi eg aftur til Føroya at vísa fram okkara kendu hárvørur, sum vit framleiða serstakliga til tín, so tú kanst fáa júst tann hárlitin og ta frisuruna, sum tú ynskir. Hesu ferð vil eg eisini fegin vísa fram okkara nýggju vøru, 'Hár fyri lívið'. Ein serstøk loysn sum vit selja sum eina skipan.

'Hár fyri lívið' er eitt nýtt og kollveltandi slag av hári, ið kann nýtast av kvinnum og monnum í øllum aldri. Her er einki minni enn avloysarin/alternativið fyri toupeir og parykkar!

Hárparturin verður settur fastur í húðina í 4 vikur í senn við einum kremi, ið verður smurt á hárbotnin. Hárið situr fast alt tíðarskeiðið og skal bert hava dagliga røkt, eins og vanligt hár.

'Hár fyri lívið' er framleitt av ektaðum hári, við einum serstakliga tunnum og ósjónligum botni. Fyrimunirnir eru fleiri; umframt at tað kennist sum títt egna hár, gevur tað møguleika fyri at velja frisuru, sum tær lystir; hárið kann vaskast og brúsast so ofta tær lystir og í mun til undanfarin sløg av hári, eru eingir kantar, sum síggjast og skulu goymast.

'Hár fyri lívið' verður selt sum ein skipan og umframt mánaðarligu tænastuna, er útskifting av hárpartinum uml. 4. hvønn mánaða íroknað haldaragjaldið. Soleiðis tryggjar tú tær, at hárið altíð situr sum tað skal og ikki nær at verða slitið, áðrenn næsti hárparturin er klárur.

Ring til mín á tel +45 9810 3211 og lat okkum avtala eina tíð, har tú kanst hoyra nærri um okkara nýggju hárskipan...

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at ringja til mín á fartel +45 4050 3211

Vinarliga
*Henning Toftild*



Budolfi Plads 9 · 9000 Aalborg · Tel +45 98 10 32 11

**www.parykker.dk**

## Starvsfólk til Statoil Argir

Statoil Argir sóknast eftir dugnaligum starvsfólki til at arbeiða skiftandi vaktir.

**Uppgávurnar eru:**
Kassin og annað vanligt handils arbeiði.

Statoil Argir leggur stóran dent á at veita góða tænastu.

Ert tú fyrikomandi, smílandi, og eldri enn 16 ár? So er tað kanska júst tær vit leita eftir.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til **Róa Snorrason á tlf. 56 40 16.**

Ljóðar hettar sum tú?
Send so eina skrivliga umsókn til:

**STATOIL ARGIR**
Traðargøta 41 • FO-160 Argir

# Starvslýsing

BO Service Sp/f er ein fyritøka í menning og við nógvum avbjóðingum. Í sambandi við vaksandi eftirspurning á arbeiðsmarknaðinum verður søkt eftir royndum fólki til HVS og ventilatiónsarbeiðir, sveisiarbeiðir, smærri maskinumvælingar og annað viðlíkahaldsarbeiði. Vit gera arbeiðir bæði fyri stovnar, virkir og privatfólk.

**Førleikakrøv**
- Vit vænta at tú hevur viðkomandi útbúgving so sum maskinmeistari/skipsmaskinistur, rørsmiðjur e.l.
- At tú ert røkin, fleksibul, hevur góð samstarvsevnir og kann arbeiða sjálvstøðugt
- Ert fúsur at finna nýggjar loysnir og ikki ert bangin fyri nýggjum avbjóðingum

Løn sambært avtalu. Nærri fæst at vita við at venda sær til Boða Olsen á tlf. 521500

**BO Service Sp/f**
Leitisgøta 7 · FO-160 Argir
T-postur: bodi@kallnet.fo
tlf. 321500 · fartlf. 521500



**Atlanticpane** P/F
Tlf.: 42 14 05 • Fax 42 16 02

## Arbeiðsfólk søkist

Søkt verður eftir fólki at arbeiða á Atlanticpane í Kollafirði til termorútaframleiðsluna og annað fyrifallandi arbeiði innan glas. Arbeiðstíðin er 40 t. um vikuna men til tíðir kann man vænta yvirarbeiði.

Løn er sambart sáttmála hjá Føroya Handverkarafelag

Meira fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 739403

Umsóknir skulu verða Atlanticpane í hendi í seinasta lagi **10. august**

**Atlanticpane P/F**
Ósabakkavegur
Postsmoga 30
410 Kollafjørður